## Ávirkar ikki marknaðin

Bumbuspreingingarnar í London í síðstu viku høvdu lítla og onga ávirkan á heimsmarknaðin. Rætt er tað, at kursirnir fullu á fleiri virðisbrævamarknaðum sjálvan bumbudagin, men longu dagin eftir hækkaðu teir.

Serfrøðingar halda, at marknaðurin hevur longu vant seg við yvirgang. Norski búskaparfrøðingurin Steinar Juel sigur við Dagsavisen, at skal tað eydnast yvirgangsmonnunum at raka heimsmarknaðin, mugu teir fremja fleiri og meiri umfatandi álop.

Búskaparfrøðingurin Peter Warren sigur, at yvirgangsatsóknirnar hava minni og minni ávirkan á ferðahugin hjá fólki. Fólk stúra meiri fyri seinkingum enn atsóknum, og tí ávirkar yvirgangurin ikki ferðavinnuna eins og fyrr. Fólk tykjast hava gloymt atsóknina á Bali, sjálvt um hon kravdi nógv fleiri mannalív enn atsóknin í London í síðstu viku, sigur Peter Warren.

## Forseti lagdur undir morð

Ein fyrrverandi ovasti í fronsku fregnartænastuni vil vera við, at fyrrverandi forsetin Francois Mitterand gav fregnartænastuni boð um at søkkja Greenpeace-skipið "Rainbow Warrior" fyri 20 árum síðani.

Pierre Lacoste hevur latið blaðnum Le Monde ymisk skjøl, sum sigast vísa, at tað var Mitterand, sum gav boðini um at søkkja Greenpeace-skipið. Tveir agentar hjá fronsku fregnartænastuni søktu skipið, og atsóknin kostaði portugisiska myndamanninum Fernando Pereira lívið.

"Rainbow Warrior" bleiv søkt í havnini í Wellington í Ný Sælandi í juli í 1985. Skipið var farið hagar fyri at mótmæla fronsku kjarnorkuroyndarspreingingunum har suðuri í Kyrrahavinum.

## Fara ikki til Danmarkar

Týskarar hava ikki so nógvar pengar um hendi nú sum fyrr, og tað hevur danska ferðavinnan fingið at kenna.

Vanliga plaga týsk ferðafólk at leiga hundraðtals summarhús í Danmark, men soleiðis er ikki í ár. Talsmenn hjá teimum, sum eiga summarhúsini, siga, at tað er lætt at fáa danir at leiga summarhúsini, nú veðrið hevur verið so gott í seinastuni, men at trupulleikin kemur seinni, tí tá plagdu týuskarar at leiga húsini. Men í ár hava teir ikki víst sama áhugan fyri Danmark.

Ferðaskrivstovurnar siga, at nógvir týskarar hava valt at fara longri suður í Evropa at halda summarfrí, meðan aðrir hava keypt sær bíligar ferðaseðlar til londini í Fjareystri heldur enn at leiga sær eitt summarhús í Danmark.

Minkandi týski áhugin fyri teimum donsku summarhúsunum kann fáa avleiðingar fyri tey, sum eiga húsini. Tey seinastu árini er prísurin á summarhúsum hækkaður sera nógv í Danmark, og nógv hava keypt ella bygt sær summarhús við tí fyri eyga at leiga útlendskum ferðafólkum tey um summarið.

## Gomul bumba

Japanskir hermenn hava júst beint burtur eina bumbu, sum eitt amerikanskt flogfar tveitti beint uttan fyri Tokyo undir seinna heimsbardaga.

Bumban, sum var 180 centimetrar long, vigaði eitt tons. Homn bleiv funnin fyri trimum mánaðum síðani í Tachikawa, men ikki fyrr enn nú bleiv hon tikin upp. Av trygdarorsøkum vórðu umleið 7.000 fólk flutt burtur frá staðnum, har bumban lá. Einki hendi kortini, men ein tíma seinni kunngjørdi herurin, at hann hevði sprongt bumbuna.

Hóast 60 ár eru liðin, síðani seinni heimsbardagi endaði, verða amerikanskar bumbur framvegis funnar í Japan. Tað hendir eisaini, at fólk koma fram á vápn frá heimsbardaganum, skrivar AP úr Tokyo. Eitt nú eru fólk komin fram á vápn, sum japanski herurin fjaldi, stutt áðrenn Japan gavst við krígnum.

## UTTAN ÚR HEIMI



*"Dennis" viknaði nakað og gjørdi tí ikki so stóran skaða, sum myndugleikarnir høvdu stúrt fyri.*

*Mynd: reuters*

# Ikki so ring sum væntað

**Tropiska ódnin "Dennis" gjørdi ikki so stóran skaða í Florida og Alabama, sum myndugleikarnir høvdu stúrt fyri.**

ÓDN

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Amerikonsku myndugleikarnir høvdu flutt meiri enn eina millión fólk burtur frá láglendinum, har "Dennis" kom inn yvir land. Tað vísti seg kortini, at ódnin linkaði nakað, beint áðrenn hon kom inn yvir land, og tí gjørdist skaðin ikki so stórur, sum myndugleikarnir høvdu stúrt fyri.

Í býnum St. Mark í Florida stóðu allar gøturnar undir í vatni, og streymveitingin fór eisini nógvastaðni. Ein trupulleiki var, at "Dennis" ferðaðist næstan somu leið sum tann harða ódnin "Ivan" í september í fjør. Tá doyðu 25 fólk, og harafturat gjørdi "Ivan" skaða fyri 14 milliardir dollarar. Umleið 40.000 hús, sum fingu skaða tá, eru ikki liðugt umvæld enn, og nógv teirra fingu aftur skaða nú, skrivar AP.

George W. Bush, forseti, lýsti sunnudagin statirnar Florida, Alabama og Mississippi vanlukkuøki.

Amerikanskir veðurmenn hava sagt, at teir vænta fleiri tropiskar ódnir í ár enn undanfarin ár.

# Mintust Screbrenica

**Umleið 50.000 fólk mintust í gjár hópmorðið í bosniska býnum Screbrenica fyri 10 árum síðani.**

HÓPMORÐ

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Umboð fyri myndugleikarnar í fleiri londum vóru hjástødd á tíggju ára minningarhaldinum til minnis um tey, sum lótu lív í Screbrenica-hópmorðinum á sumri í 1995.

Tá beindu serbiskir hermenn fyri ímillum 7.000 og 8.000 bosniskum monnum og dreingjum. 610 lík, sum eru funnin í hópgravum, vórðu jarðað í gjár eftir muslimskum siði í tí ovurstóra Potcari-kirkjugarðinum beint uttan fyri Screbrenica í landnyrðingspartinum av Bosnia.

Frammanundan vóru 1.327 bosniskir muslimar jarðaðir har, men myndugleikarnir hava gjørt pláss fyri 10.000 gravum.

# Tað fer at regna meiri í Danmark

**Metingar hjá danska umhvørvisstýrinum vísa, at tað fer at regna nógv meiri í Danmark í framtíðini.**

VEÐUR

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Danir eiga at fyrireika seg til nógv meiri regn í komandi árum, enn teir eru vanir við.

Danska veðurstovan DMI hevur mett, at avfallið fer at økjast ímillum 30 og 50 millimetrar tey næstu hundrað árini, men nú sigur umhvørvisstýrið, at vøksturin verður tvær ella tríggjar ferðir størri enn so.

Halda metingarnar hjá umhvørvisstýrinum, fer regnið at hava stórar avleiðingar við sær í framtíðini. DMU sigur, at tey, sum búgva á láglendi við áir og vøtn, kunnu rokna við vatnflóð av og á.